# Frensur í fiskiloyvinum



*Vilhelm Johannesen setti løgmanni fyrispurning um sølu av fiskiloyvum. Svarið frá løgmanni er eftir Vilhelmsa tykki líka fløkt sum alt annað í hesum málinum*

**Spurningurin um, hvørt veiði- og fiskiloyvi skulu skattast, er sera ógreiður. Løgmaður svarar fyrispurningi á tingi, og landsstýrismaðurin við fíggjarmálum leggur broytingaruppskot til skattalógina fyri tingið. Men ivin tykist kortini ikki avgreiddur**

FISKILOYVI
*Edvard Joensen*

Fiskiloyvi kunnu ikki seljast, men tað er einki forboð í móti at flyta tey millum skip ella persónar í móti gjaldi.

Men tann vinningur, sum fingin verður úr hesum flutningi skal ikki skattast, hevur Toll- og Skattaráðið tikið avgerð um. Og so hevur landsstýrismaðurin lagt uppskot fyri tingið um, at tað skal hann kortini.

Men tað er í stríð við lógina um vinnuliga fiskiskap, sigur tingmaður, sum heftir seg við, at í teirri lógini stendur, at fiskiloyvini eru ogn Føroya fólks. Og tað ber ikki til at skatta ein reiðara av pengum, sum landskassin eigur.

Her er einki, sum : »greier seg i sjøen...«.

## Løgmaður svarar

Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur svarað fyrispurningi, sum Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, hevur sett honum um skatting av veiði- og fiskiloyvum, sum seld verða milum skip ella reiðarí.

Løgmaður sigur í svari sínum ongastaðni nakað um sølu yvirhøvur. Hinvegin tosar hann fleiri ferðir um flyting av loyvum millum loyvishavarar. Hann sigur millum annað soleiðis í svarinum:

»Sambært verandi siðvenju merkir hetta, at veiðiloyvi og fiskiloyvi við tilhoyrandi rættindum (fiskidøgum ella kvotum) verða flutt. Fiskimálastýrið er í samband við flytingar av veiðiloyvum vorðið kunnugt við, at hann, sum hevur flutt veiðiloyvi, hevur flutt tað í móti gjaldi. Tað sæst ikki vera forboð ímóti hesum í lógini.«

Víðari sigur løgmaður í svarinum til Vilhelm Johannesen soleiðis:

»Samanumtikið kann tí sigast, at fiskiloyvir kunnu ikki seljast, men at veiðiloyvi og tilhoyrandi rættindi sambært § 8 í lógini (um vinnuliga fiskiskap blðm.) kunnu flytast. Um flytingin av veiðiloyvi og rættindum verður gjørd móti gjaldi, kann Fiskimálastýrið ikki forða fyri hesum«.

## Vilhelm ónøgdur

Vilhelm Johannesn, løgtingsmaður, sum setti løgmanni fyrispurningin, er ikki nøgdur við tað, sum løgmaður svarar.

Hann vísir á, at tað er í stríð við lógina um vinnuliga fiskiskap frá 1994, at tað skal bera til at selja, ella sum løgmaður sigur, flyta í móti gjaldi, loyvi til at gera nýtslu av ogn Føroya fólks. Tí tað er júst tað, fiskurin er, stendur í lógini um vinnuliga fiskiskap.

Har stendur soleiðis: »Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroys fólks....«

Hetta skuldi Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, fáa greiði á við eini dagfesting av lógini um vinnuliga fiskiskap. Hesar broytingar skuldu steðga allari spekulatión við veiði- og fiskiloyvum, varð sagt.

Men hendan lógarbroyting letur bíða eftir sær, sigur Vilhelm Johannesen.

Í staðin er tað hent, at Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, er komin í tingið við lógarbroytingum til Skattalógina, sum skal gera tað møguligt at skatta tann vinning, sum fæst av at flyta loyvi sínámilum.

Grundin til at Karsten Hansen leggur uppskot fyri tingið um skatting av vinningi av sølu av fiskiloyvum er, at Toll- og Skattaráðið hevur gjørt av, at slíkur vinningur ikki er inntøka og tí ikki kann skattast.

## Í stríð við lógina

Uppskotini hjá Karsteni Hansen ganga út uppá, at veiðiloyvi og fiskiloyvi skulu viðgerast sum onnur rakstrargøgn. Tað vil siga á sama hátt, sum tá skip ella maskinur verða seld.

Seljarin skal inntøkuføra tann pening, hann fær fyri veiðiloyvið, sama ár, sum selt verður.

Keyparin skal hinvegin sleppa at draga hann frá í rakstrinum. Um keypt veðru til brúks í fleiri ár, skal upphæddin avskrivast yvir líka nógv ár.

Hetta uppskotið er beint í Fíggjarnevndina, har tað nú er til viðgerðar, sigur Vilhelm Johannesen.

Men hann dugir ikki at skilja, at Karsten Hansen, landsstýrismaður er komin við slíkum uppskoti. Tí tað er beinleiðis í stríð við lógina um vinnuligan fiskiskap.

Hon sigur jú heilt greitt, vísir Vilhelm Johannesen á, at tilfeingið er ogn Føroys fólks. Tann, sum fiskar tað, fær sostatt vinning av nøkrum, sum er annans ogn. Í hesum førinum Føroya fólks.

– Men ta ber jú ikki til at skatta ein reiðara av ogn hjá øðrum. Tí er uppskotið hjá Karsteni ikki í tráð við galdandi lóg, vísir Vilhelm Johannesen á.

At Toll- og Skattaráðið ikki metir vinning av loyvissølu sum inntøku, kemst av, sigur Vilhelm Johannesen, at Ráðið heldur loyvini vera ogn, og ognarskatt hava vit ikki í Føroyum.

– Jú, tað er ogn, má eg enn einaferð ásanna, sigur hann. Men ogn hjá Føroya fólki.

So alt í alt er hetta málið so fløkt, at eingin fær skil á tí. Hvørki embætismenn ella politikarar, sigur Vilhelm Johannesen, sum heldur, at tað er tíð uppá, at Jørgen Niclasen kemur við tí fráboðaðu broytingini í lógini um vinnuliga fiskiskap, sum skal steðga hesum hurlivasanum.



*Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur svarað Vilhelmi Johannesen, løgtingsmanni, upp á fyrispurning um sølu av fiskiloyvum. Løgmaður nevnir ongastaðni orðið søla, men ásannar, at einki kann forða fyri flutningi av veiði- og fiskiloyvum fyri pengar millum tveir partar*



# Nýhugsan úr føroyskari ull



*Ung genta í niðurdeili og húgvu frá Pau*
*Mynd: Anna Katrina Højgaard*



*Smágenta í kjóla, frakka og húgvu frá Pau*
*Mynd: Anna Katrina Højgaard*



*Smágentur í kjóla og troyggju frá Pau*
*Mynd: Anna Katrina Højgaard*

**– Tað er upplagt at brúka føroysku ullina. Harða kappingin ger, at vit mugu gera nýggj og spennandi klæði alla tíðina, sigur Anna Mortensen, annar ánarin av nýggja handlinum Pau í Havn**

KLÆÐI
*Turið Kjølbro*

Seinasta leygardag læt nýggi handilin Pau upp í Dr. Jakobsensgøtu í Havn. Tað eru tær báðar Anna Mortensen av Tvøroyri og Dania Danielsen úr Havn, sum eiga og reka handilin. Báðar eru tær útbúnar á handarbeiðsskúla í Danmark, og tað er haðani hugskotið at virka klæði úr føroyskari ull er sprottið. Fyri trimum árum síðani byrjaðu tær so smátt, fyrst í Danmark, men síðani tær eru fluttar heim aftur, er gongd veruliga komin í framleiðsluna. Í eina tíð hava vørur teirra verið seldar í handlinum hjá Suðuroyar Ullarvirki á Áarvegnum í Havn.

– Vit hava alla tíðina ætlað at stovna egnan handil. Tað er eitt stórt lop at lata handil upp, men vit trúgva uppá, at tað ber til, sigur Anna Mortensen.

Klæðini, Pau framleiðir, eru fjølbroytt. Frakkar, jakkar, troyggjur, húgvur, blusur, niðurdeilar, kjólar og annað. Yvirklæðini verða framleidd úr samfingnari ull frá Suðuroyar Ullarvirki og Snælduni. Til onnur pløgg verður nappað ull frá Snælduni brúkt.

– Vit leggja okkum eftir at gera design, sum hóskar til tíðina, bæði modernað, ótradisjónell og klassisk, og bæði til børn, ung og eldri. Klassisku klæðini halda vit fast við eina tíð, summi fella frá skjótari enn onnur, men eg rokni ikki við, at vit koma við nýggjari kolleksjón tvær ferðir um árið. Tað hava vit ikki orku til. Tí koma nýggj klæði so við og við, sigur Anna Mortensen.

Anna Mortensen býr og arbeiðir á Tvøroyri. Hon hevur verkstað heima, har fólk eisini kunnu koma at keypa. Tá ið Anna og Dania búðu í Danmark, seldu tær pløgg í Keypmannahavn og Svøríki. Tær hava í umbúna at selja pløgg uttanlands aftur, í Noregi, Svøríki og Danmark.

– Vit royna at hava prísin so lágan sum til ber, soleiðis, at ung fólk eisini kunnu keypa.

Kappingin um at bjóða seg fram við klædnavørum úr føroyskari ull er hørð.

– Tað er upplagt at brúka føroysku ullina. Fólk høvdu ivaleyst tímað betur at selt ullina, um tey fingu meiri fyri hana. Málið má vera, at øll ullin verður brúkt. Síðani vit byrjaðu, eru fleiri farin at bjóða seg fram við vørum úr ull, og tað er bara gleðiligt. Tess størri er avbjóðingin til okkum. Kappingin ger, at vit mugu gera nýggj, spennandi klæði alla tíðina, og tað setur stór krøv til okkum, sigur Anna Mortensen.

Møguliga fara Anna og Dania at tilevna pløgg úr øðrum tilfari enn ull í framtíðini. Tær umhugsa at brúka skinn og annað tilfar eisini, og gongst sum tær ætla, fer ein seymistova í Sandvík at seyma pløggini fyri Pau.

# Føroya søga til norðurlendingar

**Færingernes land - Historien om den færøske nutids oprindelse eftir Hans Jacob Debes, dr. Phil, kemur út á donskum**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Í morgin fríggjadagin gevur granskingarforlagið Multivers í Keypmannahavn út bókina Færingernes land – Historien om den færøske nutids oprindelse eftir Hans Jacob Debes, dr. Phil. Bókin er skrivað á donskum til lesarar í Norðurlondum. Stuðlað útgávuni hava føroyskir og danskir grunnar umframt føroyskt vinnulív. Staðið fyri útgávuni í samráð við høvundin hava søgufrøðingurin Kristian Hvidt, dr. phil, sum í nógv ár var arkivarur í danska fólkatinginum, og Steen A. Cold, skrivstovustjóri. Hesin var sum kunnugt fyrsti stjórin í Norðurlandahúsinum í Føroyum.

Hon er ein lýsing av sjálvsstýris- og sambandseyðkennum í føroyskari mentan og politikki fram til dagin í dag. Umframt lýsir hon rørslur í Europa, serliga í Noregi og Íslandi og sjálvsagt Danmark eisini, sum føroyska lagnan er heft at.

Í bókini, sum er umleið 400 blaðsíður, eru 60 savnsmyndir úr føroyskari søgu, og tekningar, sum Ingálvur av Reyni hevur gjørt. Hetta er fyrsta bókin á øðrum máli enn føroyskum um høvuðstættirnar í føroyskari samfelags- og mentanarmenning, sum kemur út í Norðurlondum síðani bókina eftir Jørgen-Frants Jacobsen, sum kom fyri 70 árum síðani.

Bókin verður seld í øllum Norðurlondum. Hon verður løgd fram á Christiansborg miðskeiðis í hesum mánaðinum. Leygardagin verður framløga av bókini í Norðurlandahúsinum í Havn við móttøku. Útgevarar og Henrik Borberg, stjóri á forlagnum, eru hjástødd.

